# Nýggjur Peugeot Expert



*Nýggi Peugeot Expert kemur á marknaðin fyrsta ársfjórðing í 2007*

**Fyrsta ársfjórðing í 2007 kemur ein heilt nýggjur Peugeot Expert á marknaðin, sum er bæði størri, rumligari og lastar meira enn forgangarin. Umframt sum vørubilur fæst Expert eisini sum persónbilurin Expert Combi**

BILAR

Tá Peugeot Expert av fyrstan tíð kom á marknaðin í 1995, var hann ein av pionerunum í klassanum fyri smærri vørubilar.

Hesin nýggi er triðja generatión av Expert og er eins og forgangarin gjørdur av PSA Peugeot Citroën i samstarvi Fiat.

Bilurin verður gjørdur bæði sum vørubilurin Expert og sum persónbilurin Expert Combi, sum hevur upp til 9 sitipláss.

Nýggi Expert er nakað størri enn forgangarin. Vørurúmið er eisini størri, og bilurin lastar nú upp til 1.200 kg í mun til 930 kg. Vørurúmið er formað soleiðis at lættliga tekur ein Euro-platt.

Bæði Expert og Expert Combi hava dragihurðar á høgru síðu, men fáast við dragihurðum á báðum síðum sum eykaútgerð.

Eins og forgangarin hevur nýggi Expert góðar koyrieginleikar, samstundis sum hann ber vektina væl.

Tríggir ymiskir HDi dieselmotorar verða at velja ímillum: 1,6 litur við 90 hk (5-gir), 2,0 litur við 120 hk (6-gir) og 2,0 litur við 136 hk (6-gir) og sótlfiltri.

Nýggi Expert kemur á marknaðin fyrsta ársfjórðing í 2007.




# Volvo C30 vunnið ”Det Gyldne Rat”



*Volvo C30 er kosin sum vinnari av Det Gyldne Rat í sokallaða ”Compact Estate” klassanum*

**Volvo Car Corporation hava fyri triðju ferð vunnið týsku heiðurslønina ”Det Gyldne Rat”. Hesaferð var tað tann heilt nýggi Volvo C30, sum fekk hendan heiðurin**

BILAR

Ein dómsnevnd við 25 bilserfrøðingum frá ymiskum londum hevur kosið nýggja Volvo C30 sum vinnara í sokallaða ”Compact Estate” klassanum.

Tað er týska avísin ”Bild am Sonntag”, sum stendur fyri Det Gyldne Rat. Avísin hevur eitt upplag upp á 2,3 milliónir. Volvo Cars hava tvær ferðir fyrr vunnið hendan heiðurin: í 2000 við Volvo S60 og í 2004 við Volvo V50.

Volvo C30 hevur eisini vunnið ”Auto Bild Design Award”, sum er ein týðandi designheiðursløn í Týsklandi. Tað er bilmagasinið Auto Bild, sum biður lesarar sínar siga, hvønn bil tey halda vera tann flottasta í sínum klassa.

